# Steypakappingin byrjar hetta vikuskiftið

Ítróttarhøllin í Runavík verður karmur um fyrru steypakapping í estetiskum fimleiki, tað er Føroya Fimleikasamband, sum skipar fyri henni.

Her fara 21 lið at luttaka. Luttøkan er tann sama sum við byrjan seinasta ár, og hetta fegnast Føroya Fimleikasamband um. Tað eru feløg sum bæði hava a og b lið, so ikki kann sigast anna enn at tað er stórur áhugi fyri estetiskum fimleiki, sjálvt um tað er ein strævin og krevjandi venjing hjá íðkarum og venjarum. Áhugin er tó størri, men tað er mangul upp á venjarar til at taka sær av liðunum.

Feløgini sum luttaka verða Flog úr Fuglafirði, við smágentum og unglingum, har er minkað við liðum, tey fáa ikki mannað eitt pinkulið og gentur. Støkk av Glyvrum, við pinkum a og b, smágentum a og b gentum, unglingum og kvinnum. Havnar Fimleikafelag hevur a og b bæði í pinkum, smágentum, gentum og unglingum og eitt kvinnulið. Og Ljósið úr Havn hevur til hesa kapping meldað til við smágentum, gentum og kvinnum. Tey venja pinkur og unglingar eisini, og vóna vit at tey verða við til næstu kapping. Klaksvíkar fimleikafelag hevur eisini tvey lið,og vóru við fyrstu ferð í fjør, vit vóna eisini at síggja tey til næstu kapping.

Kappingarnar verða lagdar runt um í landinum,ella har sum feløg íðka estetiskan fimleik, og kunnu verða við í kappingunum. Á hendan hátt kunnu vit lýsa tað fantastiska stóra og krevjandi arbeiðið, sum bæði venjarar og fimleikarar gera. Tí teimum dámar tað, annars hevði eftirspurningurin ikki verið so stórur.

Til kappingarnar krevur stórt arbeiði at leggja til rættis, dómararnar seta seg væl inn í regelugerðirnar, dømt verður fyri tað tekniska, listarliga og fyri framførslu. ´Teir fara út til feløgini, tá boð er eftir teimum, fyri at kanna ella fylgja við um liðið nú hevur øll krøvini við sum kravd verða til seriuna. Til at klárgera hallirnar, tá ið kappingar eru, heitir fimleikasambandið á feløgini um at hjálpa til, tað er eitt sera stórt arbeiðið og ta hjálp kunnu vit ikki verða fyri uttan.

Kappingin byrjar leygardagin kl. 14.00 og verða tað smágentur, unglingar og kvinnur sum kappast.

Sunnudagin verður byrjað kl. 15.00, tá kappast pinkur og gentur.

Kappingarnar enda báðar dagarnar við heiðursmerkja handan til 1-2-3.

Føroya Fimleikasamband ynskir fimleikarum, venjarum, dómarum góða eydnu, og til áskoðararnar: njótið løtuna.

Atgongumerkið til kappingarnar kosta kr. 100,- fyri vaksin og kr. 20,- fyri børn.

**FFS.**




*Kortið vísir friðaða økið kring Tinganes*

# Økisfriðing kring Tinganes forðar ikki dýping av havnini

TÍÐINDASKRIV

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur tikið avgerð um at friða umliggjandi øki kring forna tingstað føroyinga á Tinganesi í Havn.

"Avgerðin um at friða økið tryggjar, at fornminni og mentanarumhvørvið í Tinganesi verða vard fyri eftirtíðina. Økisfriðingin forðar ikki fyri útbyggingarætlanum í økinum, men hevur við sær, at útbyggingarætlanir í friðaða økinum skulu góðkennast av fornminnafriðingarmyndug leikunum, sigur Helena Dam á Neystabø, sum saman við Andrasi Mortensen, landsantikvari, hevur havt kunnandi fundir við umboð fyri Tórshavnar kommunu, Tórshavnar Havn, Strandfaraskip Landsins og onnur.

Friðingin fevnir um øki kring bygningar og fornminni á Tinganesi, sum vórðu friðað í 1956 og búmerki og onnur jarðfest fornminni, ið eru friðað sambært løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum. Harumframt fevnir friðingin um øki á sjónum, 50 metrar úr landi.

Landsstýriskvinnan hevur friðað økið eftir tilmæli frá Fornminnisnevndini og við heimild í løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum. Talan er um matr. nr.1, 2, 3, 4, part av 5, 7, 8, 9, 10, 12a, 12b, 12c, 12d, part av 151a og økið á sjónum, 50 metrar úr landi.

Í tilmælinum til landsstýriskvinnuna skrivar fornminnisnevndin: "Tinganes er forni tingstaður føroyinga. Har hevur ting verið hildið í víkingaøld og miðøld, og handil føroyinga við umheimin fyri fríhandilsskipan¬ina, sum kom í lag í 1856, verið miðsavnaður. Saman við friðaðu bygningunum er Tinganes ein estetisk lendisheild, sum er ein týðandi liður í tí føroyska mentanararvin¬um. Fyri at varðveita upplivingina av hesi lendisheild verður skipað fyri økisfriðing kring hana. Endamálið við økisfriðingini er at tryggja, at fornminnini og tað mentanarsøguliga umhvørvið í framtíðini ikki verða skemmað fysiskt ella estetiskt."

**Mentamálaráðið 28. januar 2010**

**Helena Dam á Neystabø landsstýriskvinna**

# Nýggjur barnagarður í Hoyvíkshaga

Tórshavnar Býráð hevur samtykt at játta pening at fara undir at projektera nýggjan barnagarð og vøggustovu í Hoyvíkshaga.

Hesin stovnur hevur verið á tekniborðinum leingi, men arbeiðið varð steðgað fyri fimm árum síðani, tí tørvurin á stovnum tóktist nøktaður.

- Nú meta vit, at neyðugt verður við einum nýggjum stovni til tess at kunna røkja barnaansingina í kommununi á fullgóðan hátt, sigur formaðurin í mentamálanevndini Jógvan Arge.

Felagið Arkitektar 99 gjørdi í 2004 dispositiónsuppskot til ein stovn, sum var ætlaður 72 børnum á vøggustovu og barnagarði. Hetta verður útgangsstøðið fyri arbeiðnum, sum nú verður tikið uppaftur.

Stovnurin er ætlaður at liggja dygst við Dalin langa í Hoyvíkshaganum, har fólkavøksturin hevur verið stórur seinastu árini og stendur við.

Býráðið samtykti í gjárkvøldið einmælt at játta eina millión krónur til at fara undir at projektera stovnin.

Kommunan greiðir frá, at hon hevur ilt við at taka børn upp á stovnarnar alt árið. Hetta ger ansingarskipanina óliðiliga. Hon megnar toluliga væl at taka børn upp út í desembermánaða, men við ársbyrjan 2010 var aftur bíðilisti.

Umsitingin arbeiðir við uppskoti um sonevnda vippunormering, ið merkir, at færri børn eru á stovnunum um heystið og fleiri børn um várið, men tá árið er av, hevur stovnurin havt tað talið av børnum, hann er normeraður til. Hetta krevur, at fleiri pláss eru í skipanini, tí sum nú er, eru allir dagstovnarnir fullir alt árið.

Kommunan hevur í nøkur ár roynt at víðka dagrøktarskipanina, men tað gongur striltið. Ein gongd leið burtur úr hesum tronganum er at útvega fleiri dagstovnar at nøkta bæði tann akutta og framtíðar tørvin.

Tórshavnar kommuna heldur, at dagstovnaskipanin eigur at vera so mikið stór, at til ber at bjóða foreldrum, ið flyta til Tórshavnar kommunu, pláss á dagstovni tann dagin, tey flyta í kommununa.

- Vit meta,, at í fyrstu atløgu ber til at røkka hesum málum við at útvega ein dagstovn aftrat, sigur Jógvan Arge, formaður í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs.